**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 96/2025: Uppskot til løgtingslóg um at útvega nýggjan bygning til Sjúklingahotellið í Keypmannahavn**

Landsstýriskvinnan í heilsu- og orkumálum, Eyðdis Hartmann Niclasen, hevur lagt málið fram 24. apríl 2026, og eftir 1. viðgerð 28. apríl 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 4. og 8. mai 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í heilsu- og orkumálum, Eyðdis Hartmann Niclasen, saman við Sjúkrahúsverkinum.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Føroyska sjúklingahotellið í Keypmannahavn rúmar ikki longur øllum sjúklingunum, sum verða sendir til Keypmannahavnar til sjúkuviðgerðir, og teirra avvarðandi. Tí verður nú arbeitt við at fáa til vegar eitt nýtt sjúklingahotell.

Landsstýriskvinnan hevur upplýst undir viðgerðini, at ein tørvsmeting er gjørd, og at ætlanin er at útvega eitt nýtt sjúklingahotell við 150 plássum, sum verður mett at nøkta tørvin fram til 2050.

Eitt hóskandi grundøki er funnið, tætt við Ríkissjúkrahúsið. Danski staturin eigur grundøkið, og arbeitt verður við eini loysn, har Bygningsstyrelsen í Keypmannahavn byggir bygningin. Bygningsstyrelsen skal eiga bygningin og hava ábyrgd av uttandura viðlíkahaldi og tekniskum høvuðsinstallatiónum, meðan landsstýrið skal leiga bygningin og hava tær vanligu skyldurnar sum leigari.

Sum útgangsstøði rindar landið ikki nakað fyri næsta stigið í byggiætlanini, tí útreiðslurnar verða eftir ætlan íroknaðar ein komandi leigukostnað. Tó stendur í lógaruppskotinum, at um verkætlanin av eini ella aðrari orsøk verður av ongum, hevur landið eina møguliga skyldu at rinda fyri arbeiðið, sum er sett í gongd, tó í mesta lagi 10 mió. kr.

Í sambandi við at Bygningsstyrelsen skal byggja bygningin, og at landskassin kann verða noyddur at rinda upp til 10 mió. kr., um ætlanin av eini ella aðrari orsøk verður av ongum, er neyðugt at seta eina heimildarlóg í gildi. Hon skal geva landsstýriskvinnuni neyðugu heimildirnar at samstarva við Bygningsstyrelsen við avtalaðu treytunum. Við hesum uppskotinum verður skotið upp, at landsstýriskvinnan fær hesa heimildina.

Fíggjarnevndin hevur fingið upplýst, at tað fara helst at ganga eini 5 – 6 ár, áðrenn tað verður klárt at flyta inn í nýggja sjúklingahotellið; tað veldst millum annað um, hvussu skjótt Keypmannahavnar kommuna arbeiðir.

Fíggjarnevndin heldur tað hava stóran týdning fyri sjúklingar, sum fáa viðgerð uttanlands, og teirra avvarðandi, at tey kunnu búgva í heimligum umhvørvi saman við øðrum føroyingum, meðan viðgerðin fer fram.

Undir 1. viðgerð av málinum var møguleikin nevndur at lata føroyska byggivinnu sleppa við í verkætlanina. Og undir viðgerðini í nevndini hevur møguleikin eisini verið umrøddur at byggja eitt sjúklingahotell, sum føroyingar eiga og ikki leiga. Tó tykist áhugin fyri eini slíkari loysn ikki at vera stórur, hvørki hjá føroyska myndugleikanum og ei heldur hjá føroysku byggivinnuni.

Sjúklingahotellið í Keypmannahavn hevur hildið til í verandi bygningi síðani 2012.

Við hesum viðmerkingunum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 12. mai 2026**

Helgi Abrahamsen
formaður

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
næstforkvinna

Bill Justinussen

Bjarni Hammer

Eyðgunn Samuelsen

Bjørg Brynhildardóttir Egholm

Ruth Vang